ARBEIÐSEFTIRLITIÐ
*Administration of Occupational Safety and Health*
Fútalág 1B ✪ P.O.Box 1134 ✪ FO-110 Tórshavn ✪ Faroe Islands
Tlf. +298 317811 ✪ Fax +298 314489 ✪ E-mail: info@arbeidseftirlit.fo

***Skrásetingar nr.:***

**L-E001-2**

# Leiðbeining
# um
# Sveisiljós og trygdarreglur

**Sveisiljós kann geva eygnaskaðar!**



Vernd móti sveisiljósi byrjar á ráðleggingarstig-num. Tryggleikabólkurin skal vera við í ráðleggingini.



Í arbeiðsfrágreiðingini skal fyriskrivast, hvat av skermum, eygnavernd o.ø. skal brúkast.

***Lógarheimild:***
Kunngerð nr. K-A012-2 um evni og tilfar frá 25.08. 1983.
Kunngerð nr. K-A005-1 um persónliga verndarútgerð frá 04.09.1995.
Kunngerð nr. K-A005-2 um trygdarkrøv til persónliga verndarútgerð frá 04.09.1995.

***Útgivið fyrstu ferð:***
**1. juni 1983**

***Seinastu broytingar:***
**3. juni 1996**

**Arbeiðsgevarin skal síggja til:**

at tað er nokk av hóskandi skermtilfari til staðar.





at góðkend gløs merkt við tættheitsstigi, sum passa til arbeiði, eru tøk.

**Arbeiðsleiðarin skal síggja til:**

at fyriskrivaðir skermar eru uppsettir, áðrenn byrjað verður at sveisa.

at tann persónliga verndaútgerðin verður útflýggjað.






at øll verða gjørd kunnug um vandan av sveisiljósi og nýtslu av rættari verndarútgerð.

at verndarútgerðin verður brúkt.

**Sveisarin skal síggja til:**

at varskógva onnur, sum skulu arbeiða nærhendis arbeiðsstaðnum





at skermar verða uppsettir sum fyriskipað.

at brúka ta persónligu verndarútgerðina sum er útflýggjað.

**Brúka eygnavernd við røttum tættheitsstigi!**

*Allir arbeiðarar* skulu gerast varugir við, at bert stutt ávirkan av sveisiljósi kann geva eygna-skaðar.

*Minnist til:* eygnavernd verjir móti skaða, eygnasalva doyvir bert pínuna, tá skaðin er hendur.



| Streym-styrki í amp. | Tilráðilig tættheitsstig fyri eygnavernd við: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Ljós-bogasv. | MIG stál | MIG lættmet. | TIG | $CO_2$ |
| 1 | | | | | |
| 5 | | | | | |
| 15 | | | | 9 | |
| 30 | 9 | | | 10 | |
| 60 | 10 | 10 | | 11 | 10 |
| 100 | 11 | 11 | 10 | 12 | 11 |
| 150 | | | 11 | | 12 |
| 200 | 12 | 12 | 12 | 13 | 13 |
| 250 | | | | 14 | |
| 300 | | | 13 | | 14 |
| 400 | 13 | 13 | 14 | | |
| 500 | | | | | |
| | 14 | 14 | 15 | | 15 |

**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ**, 3. juni 1996.

Eli Davidsen, stjóri